

Vika 25:
Leiðin til London

8 síður við spennandi tilfari um summar

# Norsk Hermetikkmuseum

Stavanger hevur ikki altíð verið ein oljubýur, langt frá tí. Í gomlum døgum var Stavanger tætt tengt at sjónum, sum so mangir aðrir strandabýir.

Kendi Geiranger fjmørðurin, sum er 30 fjórðingar langur og heilar 700 metrar djúpur, var fyrr eitt gullnám av sild, og eingin dugdi at ímynda sær annað livibreyð enn tað. Men sum kunnugt fekk tað eina enda, og Geiranger fjørðurin er nú eitt av mest vitjaðu ferðamannamálunum í Noregi.

Stavanger hevði eisini sítt gullnám í sjónum. Men her var talan um brisling. Gamla hermetikkfabrikkin er varðveitt og umbygd til museum, og til ber at fylgja framleiðsluni heilt frá brislingurin kemur inn á fabrikkina, til hann er latin í konservesdósir.

Eitt annað serstakliga áhugavert við hesum museuminum er leiðarin. Hann er breti, og umvegis afrikanskur oyðimørkina endaði hann í Stavanger sum museumsleiðari.

Hann livdi sum granskari í fleiri ár í Afrika, og har hitti hann norska kvinnu sum síðani skuldi gerast kona hansara. Nú arbeiðir hann so á Norsk Hermetikkmuseum, har hann við stórari vitan greiðir frá um brislingaframleiðslu.

Vit venda aftur til Norsk Hermetikkmuseum í einum seinni blað.









**Gamla brislingafabrikkin er umgjørd til museum, har tú kanst uppliva alla framleiðsluna frá tí brislingurin kemur inn, til hann liggur í laka í konservedósunum**



**Ein av avbjóðingunum á Vitenfabrikken er, at tú kanst royna tíni konsentratiónsevni. Bert við viljamegi ber til at trilla ein bólt burtur frá tær – og í tveimum royndum, vit vóru vitni til, vann gentan!**

# Vitenfabrikken

Eitt av spildurnýggju og slóðbrótandi museunum í Stavanger er Vitenfabrikken, sum læt upp í mai 2008.

Ein av hornasteinunum í nýggja museuminum er eitt planetarium við plássi fyri 60 áskoðarar. Eitt planetarium er eitt kupilformað rúm, sum verður nýtt at vísa, hvussu rúmdin sær út og at vísa fullkomnar surround filmar. Planetariið hevur fremstu atkomiligu tøknina, og er eitt av heilt fáum í heiminum á so høgum støði.

Altjóða gransking vísir eisini á astronomi sum ein týðandi hátt at fremja áhugan hjá børnum og ungum fyri fakáhugamálum.

Museumið lærir á ein áhugaverdan og aktivan hátt um ymiskt fysiologiskt og tøkniligt. Eitt nú ber til at royna reaktiónsevnini við blunkandi ljósum. Tú kanst stýra einum skipi við ljósmegi. Tú kanst royna tín logiska sans við at seta ein yvirvaksnan stól saman.

Møguleikarnir eru mangir, og tú fær lættliga nakrar tímar at ganga inni í Vitenfabrikken. Eisini sum vaksin.

Tað, sum er serliga áhugavert við einari vitjan í Vitenfabrikken er, at tú sleppur at nerta við alt. Vanliga er tað »fingrarnar burtur« á einum museum, men her er tað beint øvugt. »Nem við« eru eggjandi boðini.

Melda teg til Club Atlantic og
VINN FERÐASEÐLAR
og fá sertilboð sendandi við telduposti
Øll, sum tekna seg, eru við í lutakasti hvønn mánað um eina ferð aftur og fram á rutunetinum hjá Atlantic Airways.
Melda til á: www.atlantic.fo



Tel 34 10 00
ATLANTIC AIRWAYS
atlantic.fo